UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 18. apríl 2023
J.nr.: 22/05344-2

# Reglugerð
# fyri
# stuðulsjáttan til at útvega nýggja vitan og royndir um alternativar grønar orkumøguleikar

**Endamál**

**§ 1.** Reglugerðin ásetur treytir fyri nýtslu av játtan á konto 18.37.4.07. Orkumál.

*Stk. 2.* Endamálið við stuðulsjáttanini er, at Umhvørisstovan (Orka) og/ella Jarðfeingi fremja verkætlanir saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum til tess at útvega nýggja vitan og royndir um alternativar grønar orkumøguleikar.

*Stk. 3.* Játtanin kann eitt nú verða nýtt til kanningar, skjalfesting og til praktiskar royndir, sum Umhvørvisstovan og Jarðfeingi kunnu fremja saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum.

**Umsiting**

**§ 2.** Umhvørvismálaráðið umsitur játtanina og játtar pening til verkætlanir, sum Jarðfeingi og/ella Umhvørvisstovan fara undir. Umhvørvismálaráðið tryggjar, at verkætlanin er í samsvari við hesa reglugerð.

*Stk. 2.* Umhvørvismálaráðið kann leggja umsitingina til annan stovn at umsita eftir hesi reglugerð og árligu løgtingsfíggjarlógini, konta 18.37.4.07. Orkumál.

**Stuðulstreytir**

**§ 3.** Umhvørvisstovan og/ella Jarðfeingi kunnu fremja verkætlanir saman við kommunum, felagsskapum og privatum feløgum.

*Stk. 2.* Verður verkætlanin framd saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum, rindar landið í mesta lagi 50% av samlaða verkætlanarkostnaðinum.

*Stk. 3.* Umhvørvisstovan og/ella Jarðfeingi senda Umhvørvismálaráðnum skrivliga umsókn um stuðul til verkætlan. Umsóknin skal fevna um:

a. lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
b. greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við stuðulsjáttanini,
c. lýsing av luttakarunum og
d. arbeiðs-, tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina

Gongin 7 • 100 Tórshavn • Telefon 35 87 00 • E-mail: umhvorvi@umhvorvi.fo

*stk. 4.* Umhvørvisstovan og Jarðfeingi skulu lata frágreiðing til Umhvørvismálaráðið. Umhvørvismálaráðið ásetur í játtanarskrivinum í hvørjum líki, frágreiðingin skal latast og nær.

*Stk. 5.* Metir Umhvørvismálaráðið at tørvur er á eini ávegis frágreiðing, skal henda latast Umhvørvismálaráðnum uttan drál.

**Umsókn**

§ 4. Umsóknir skulu latast Umhvørvismálaráðnum. Lýst verður, við freist, eftir umsóknum á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum www.umhvorvi.fo.

*Stk. 2.* Umsóknir verða viðgjørdar saman við umboðum á Jarðfeingi og Umhvørvisstovuni sum hava førleikar og servitan innan økið.

**Útgjald**

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin tá Umhvørvismálaráðið hevur móttikið verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Útgjald kann eisini verða goldið fyri ávegis verkætlanarroknskapir.

*Stk. 3.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer út gildi reglugerð fyri stuðulsjáttan til verkætlanir innan orkumøguleikar úr undirgrundini frá 30. mars 2022.

Umhvørvismálaráðið, 18. apríl 2023

Ingilín Strøm
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri